Álit

í

løgtingsmáli nr. 84/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll (Atgongd til ferðafólkalistar, tillaging til verandi mannagongdir, bygnaðin á TAKS og umsiting av tolløkinum, reglur um innheinting og panting, laga tollsatsir til handilssáttmálan millum Føroyar og ES og millum Føroyar og Stóra Bretland o.a.)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 16. februar 2021, og eftir 1. viðgerð 23. februar 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18., 22., 23. og 25. mars og 8. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Faroe Agency, fútan, Jógvan Páll Lassen, advokat, Vinnuhúsið saman við Faroe Ship, Sunnevu Háberg Eysturstein og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við TAKS.

Ein samd nevnd vísir á, at TAKS hevur gjørt Fíggjarmálaráðið varugt við, at tørvur er á at dagføra og broyta nakrar av ásetingunum í tolllógini. Talan er um ásetingar, sum ikki eru tíðarhóskandi og sum ikki samsvara við galdandi mannagongdir og umsitingina av tolllógini í dag. Talan er eisini um at skipa atgongdina hjá tollvaldinum til ferðafólkalistar hjá flutningsfeløgum við kunngerð. Harafturat verður skotið upp at gera nakrar tøkniligar dagføringar av tolllógini.
Ein onnur broyting er, at tollsatsirnir (toll-og vøruskráin), sum higartil hava verið lýstir í løgtingslóg fyri seg (í løgtingslógini um tollsatsir), verða lýstir sum skjal í tolllógini. Toll- og vøruskráin er skjalið, har øll vørunummur, tollur og onnur avgjøld á vørum, eru lýst. Broytingin hevur við sær, at løgtingslógin um tollsatsir verður strikað og at toll- og vøruskráin í staðin verður lýst sum skjal í tolllógini.

Nakrar av týdningarmestu broytingunum í uppskotinum eru hesar:

- Atgongdin hjá tollvaldinum til ferðafólkalistar hjá flutningsfeløgum verður skipað við kunngerð

- Toll-og vøruskráin verður lýst sum skjal í tolllógini, og løgtingslógin um tollsatsir fer úr gildi

- Tollsatsirnir verða lagaðir til broytta handilssáttmálan millum Føroyar og ES og til handilssáttmálan millum Føroyar og Stóra Bretland

- Tollvaldið kann eftir uppskotinum krevja, at skip, sum sigla í føroyska tolløkinum, leggja at bryggju, tá tollvaldið ætlar at kanna skipið

Aftrat hesum dømunum omanfyri verða gjørdar fleiri aðrar broytingar, harav fleiri eru tøkniligar dagføringar og fylgibroytingar av øðrum broytingum.

Uppskotið hevur verið til almenna hoyring og eisini sent 15 hoyringarpørtum. Tað komu bert viðmerkingar frá Dátueftirlitinum, og er uppskotið broytt samsvarandi teim viðmerkingum, sum Dátueftirlitið hevði.

Undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at broytingin í § 28, sum heimilar tollvaldinum at krevja skip inn til bryggju, møguliga kann fara at hava neiligar avleiðingar fyri føroysk feløg.

Nevndini er tó gjørt greitt frá Fíggjarmálaráðnum og TAKS, at skip einans kunnu krevjast til bryggju, um talan er um grundaðan mistanka. Somuleiðis er upplýst nevndini, at hetta snýr seg ikki um øll skip, sum sigla ígjøgnum føroyskt sjóøki, tí skip í skaðaleysari gjøgnumsigling eru undantikin. Eftir Havrættarsáttmálanum hava øll skip rætt til skaðaleysa gjøgnumsigling í uttara sjóumveldinum t.e. úr grundlinjunum og út á 12 fjórðingar. Orðingin skaðaleys gjøgnumsigling er lýst í Havrættarsáttmálanum, og gjøgnumsiglingin skal vera uttan steðg og hóskandi skjót. Steðgur kann einans góðtakast, um hetta er neyðugt fyri vanliga sigling ella í neyðstøðu. Fremmand skip hava ikki krav uppá at koma í havn ella í innara sjóumveldið, t.e. innanfyri grundlinjurnar, uttan í neyðstøðu.
Nevndin metir tí ikki, at broytingin í § 28 fer at hava neiligar avleiðingar fyri føroysk feløg.

Nevndin er eisini kunnað um, at løgreglan ikki hevur atgongd til ferðafólkalistar hjá flutningsfeløgunum eins og hetta uppskotið nú leggur upp til skal verða galdandi fyri tollvaldið. Hetta undrar nevndina, tí sjálvandi eigur løgreglan at hava somu heimildir á hesum økinum sum tollvaldið. Nevndin heitir á landsstýrið um at fáa greiði á hesum viðurskiftum og virka fyri, at løgreglan fær somu heimildir á hesum økinum, sum tollvaldið.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 13. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	